# Uppskot um at styrkja fakliga førleikan hjá næmingum og at menna fólkaskúlan

Tilmæli frá
PISA-arbeiðsbólki




Oktober 2006

# Innihaldsyvirlit

**1. Inngangur** ... 3

**Yvirlit yvir tilmæli** ... 5

**2. Áðrenn skúlaaldur** ... 8

Fyrireiking til skúlabyrjan ... 8
Kanning (screening) av børnum undir skúlaaldur ... 8
TRAS (Tidlig registrering af sprogudvikling) ... 8
Børn við serligum tørvi ... 9

**3. Skúlaárini – karmar um undirvísing** ... 10

Lækka skúlaaldur ... 10
Fleiri tímar til yngstu flokkarnar ... 10
Floksins tími: ... 11
Styrkja náttúruvísindaligu lærugreinirnar ... 11
Felags mál í lesiætlanum ... 12
Skúlaleiðsla ... 13
Lærarin ... 13
Stuðul til næmingar ... 13
Foreldur ... 14
Lesing ... 15
Alment lesiátak ... 15
Lærarin í føroyskum ... 16
Foreldur og avvarðandi ... 16
Skúlabókasøvn ... 17
Bókaútgáva ... 17
Eftirmeting ... 18
Full eftirmetingarskipan ... 18
Næmingaeftirmeting ... 19
Landsroyndir ... 19
Støðuroyndir (diagnostiskar royndir) ... 20

**4. Kanningar av undirvísing** ... 21

**5. Ábyrgdarbýtið millum land og kommunu** ... 23

Skúlastýrið ... 23
Skúla- og fólkabókasøvn ... 24

**Bókmentalisti** ... 25

# 1. Inngangur

PISA-undankanningin vísti vánaligt fakligt avrik hjá føroyskum næmingum. Hon elvdi til kjak, sum var merkt av, at allir partar, sum varða av skúlanum, ynskja at arbeiða saman um at menna skúlan. Neyðugt er hjá øllum pørtum at taka PISA-undankanningina til eftirtektar.

Hinvegin so vísti PISA-undankanningin eisini, at næmingarnir trívast væl í skúlanum og høvdu góð viðurskifti við lærararnar. Eisini vísti kanningin, at í sambandi við kst – nýtslu, so vóru føroysku næmingarnir væl fyri.

Landsstýrismaðurin í mentamálum setti tann 13. juli 2006 arbeiðsbólk, sum skal lata landsstýrismanninum tilmæli um, hvørji átøk eiga at verða framd í fólkaskúlanum beinanvegin, soleiðis at næmingarnir kunnu styrkja sínar fakligu førleikar og læra at nýta sína vitan í breiðum høpi.

Arbeiðsbólkurin var eisini biðin um at viðgera málið við atliti at leiklutinum hjá

- Lærarum
- Foreldrum
- Kommunum
- Skúlastýrum
- Mentamálaráðnum, og
- viðvíkjandi lesiætlanararbeiði,

  sum kann menna viðurskiftini, bæði í og kring fólkaskúlan.

Við støði í PISA-undankanningini skal arbeiðsbólkurin koma við uppskotum um neyðug átøk, sum skjótt kunnu setast í verk, og viðgera onnur viðkomandi viðurskifti, sum arbeiðsbólkurin heldur hava týdning.

Átøkini skulu vera málrættað, og tað skal greitt kunna vísast á, hvar og hvussu tiltøk verða sett í verk, sum kunnu betra um støðuna hjá fólkaskúlanum.

Ætlanin við arbeiðinum hjá arbeiðsbólkinum er at koma við tilmæli um viðurskifti, sum kunnu broytast beinanvegin.

Í arbeiðsbólkinum hava verið:
Olaus Jespersen, Mentamálaráðið, formaður
Janus Jensen, Mentamálaráðið, skrivari
Karl Olsen, Føroya Kommunufelag
Magnus Tausen, Føroya Lærarafelag
Lis Mortensen, Heim og skúli
Marita Dalsgaard, Skúlaleiðarafelagið
Ingibjørg Berg, Kommunusamskipan Føroya
Jóan Petur Hentze, Kommunusamskipan Føroya
Doris Hansen, serráðgevi

Heitt var á arbeiðsbólkin um at seta seg í samband við Føroya Pedagogfelag, serliga viðvíkjandi skúlabyrjan, fyri at fáa samanhang millum barnagarð og fólkaskúla.

Fundur hevur 7. september 2006 verið við:

- Føroya Pedagogfelag
- Føroya Skúlabókagrunn
- Meinar Ortind, næming í 10. flokki í Tórshavnar Kommunuskúla

Niels Egelund, professari, ið hevur skrivað PISA frágreiðingina, Júliús Bjørnsson, ið er íslendskur PISA-serfrøðingur, og Peder Haug, ið er professari og hevur staðið fyri fleiri PISA átøkum í Noregi, hava verið á fundi við arbeiðsbólkin 14. september 2006.

Arbeiðsbólkurin hevur havt 12 fundir .

Um Veturnætur 2006

| | | |
|---|---|---|
| Olaus Jespersen | Janus Jensen | Karl Olsen |
| Magnus Tausen | Lis Mortensen | Marita Dalsgaard |
| Ingibjørg Berg | Jóan Petur Hentze | Doris Hansen |

| **Yvvirlit yvir tilmæli:**<br><br>*K= kommunurnar<br>*M= Mentamálaráðið | | **Skjótt at seta í verk** | **Kann setast í verk** | **Krevur økta árliga fígging** | **Krevur íløgu** | **Krevur lógarbroyting** | **Krevur bygnaðarbroytingar** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Áðrenn skúlaaldur** | Lóggáva og yvirskipað umsjón á dagstovnaøkinum verður løgd til Mentamálaráðið | | x | | | x | x |
| | Skiftið úr barnagarði í skúla verður samskipað. | | x | | | | |
| | Kanningar- og eftirmetingarskipanir verða gjørdar fyri øll børn undir skúlaaldur, so at menningin verður tryggjað, og at neyðug serhjálp kann verða givin, um tørvur er á tí. | | x | K*<br>M* | | | |
| **Karmar um undirvísing** | Fra 1. august 2008 verður skúlaaldurin lækkaður, soleiðis at føroysk børn byrja skúlagongdina 6 ára gomul. Ásetta skúlatíðin er 10 ár. | | x | K<br>M | | x | |
| | Serlig undirvísingartilboð við øðrvísi innihaldi verða skipað eftir loknan 10. flokk | | x | K<br>M | | x | |
| | 1. flokkur skal hava 25 vikutímar<br>2. flokkur skal hava 28 vikutímar<br>3. flokkur skal hava 30 vikutímar | | x | M | | x | |
| | Frá 1. august 2007 verður ein vikutími settur av til floksins tíma í øllum flokkum | | x | M | | x | |
| **Styrkja náttúruvísindaligu lærugreinirnar** | Náttúra- og tøkni kemur á tímatalvuna við 2 undirvísingartímum um vikuna úr 1. flokki og upp í 6. flokk. | | x | M | | x | |
| | Alis- og evnafrøði verður kravd lærugrein í 7., 8. og 9. flokki við trimum undirvísingartímum um vikuna. | | x | M | | x | |
| | Skipað verður eitt undirvísingarforum, sum verður mannað av fólkum frá viðkomandi stovnum, umboðum fyri skúlaleiðslur og foreldrefelagnum Heim og Skúli | x | | | | | |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Skúlaleiðsla:** | Útbúgving og eftirútbúgving til skúlaleiðslu | x | | M | | | |
| | Betri stundir til leiðslu | x | | M | | | |
| | Skúlar í ávísari stødd skulu hava skrivstovuhjálp | x | | K | | | |
| **Lærarin** | Lærarar taka linjulestur á Lærara-skúlanum. Alt tað ber til, eiga lærarar bara at undirvísa í sínum linjugreinum | | x | M | | | |
| | Eftirútbúgving verður samskipað við støði í gransking, kanningum og nýggjastu námsfrøðiligu rákunum bæði í Føroyum og úti í heimi | | x | M | | | |
| **Stuðul til næmingar** | Serlig tilboð skulu vera til atferðartruplar næmingar | | x | M | | | |
| | Økt tímatal til serundirvísing | | x | M | | | |
| | Pedagogar kunnu setast at taka sær av ávísum uppgávum | | x | M | | | |
| **Foreldur** | Seta í verk royndartiltøk á ymsum skúlum, sum vísa á/finna hóskandi hættir í føroyska skúlanum at styrkja foreldrasamstarvið | x | | | | | |
| | Skipa floksráð við t.d. 2 foreldrum, flokslærara og 2 næmingum, eins og gjørt verður í t.d. Danmark og Noregi | x | | | | | |
| **Lesing** | Fleiri tímar eiga at setast av til føroyskt á tímatalvuni fyrstu árini í skúlanum | | x | M | | x | |
| | Hvønn dag eiga allir næmingar at lesa í 20 minuttir í skúlanum. Næmingar í 1. og 2. flokki eiga somuleiðis at skriva hvønn dag í 20 minuttir | x | | | | | |
| | Á hvørjum floksstigi verður skipað fyri lesiskeiðum, lesidøgum ella -vikum, har innihaldið er tillagað eftir, hvørjum lesistigi næmingurin er á. | x | | K<br>M | | | |
| | Á hvørjum floksstigi verður ráðlegging í lesing um hvønn einstakan næming við støði í kanningum og eygleiðingum, ið serlærarin/lærarin í føroyskum hevur gjørt. | x | | | | | |
| | Skipað verður fyri almennum lesiátaki | | x | M | | | |
| | Longri upplatingartíðir til skúlabókasavn | | x | M | | | |
| | Bókasavnsnýtsla gerst ein partur av lesiætlanini í flestu lærugreinum. | x | | | | | |
| | Bókasøvnini skulu vera ein sjónligur partur av almenna lesiátakinum. | x | | | | | |
| | Økt játtan til bókaútgávu | | x | M | | | |
| | Nútímans telduútgerð í skúlunum | | x | K | K | | |
| | Styrkja teldufførleika læraranna | | x | M | | | |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Eftirmeting** | Sett verður í verk full eftirmetingar-skipan fyri føroyska fólkaskúlan | | x | M | M | | |
| **Kanningar av undirvísing** | Seta í verk kanningar og granskingarverkætlanir í samstarvi við útlendskar granskarar av føroyskum skúlum og undirvísing | | x | M | M | | |
| | Læraraskúlin og Fróðskaparsetrið skulu luttaka í kanningar-/granskingararbeiðinum, og starvsfólk frá hesum stovnum skulu í mest møguligan mun gera hetta arbeiðið | | x | M | | | |
| | Meginfyrisitingin av skúlaverkinum verður kannað av altjóða serfrøðingum t.d. OECD-serfrøðingum | | x | M | | | |
| | Landsmiðstøðin skal vera námsfrøðiligur kveikjari. Høvuðs-arbeiðið hjá lærugreinaráðgevunum verður í Landsmiðstøðini. Lærugreina-ráðgevin skal vera samskipandi fyri alt landið fyri sítt lærugreinaøki. | x | | M | | | |
| **Ábyrgdarbýtið millum land og kommunur** | Eintýðug avgerðar- og fíggjarábyrgd millum land og kommunur | | x | K<br>M | | x | x |
| | Kommunurnar skulu umsita fólkaskúlan<br>Skipað útleggingartilgongd verður sett í gongd sum skjótast, har treytir, krøv, fígging v.m. verða ásett | | x | K<br>M | | x | x |
| | Mentamálaráðið hevur ábyrgdina av lógum, reglum og krøvum til kommunurnar og skúlan annars, og hevur antin sjálvt ella umvegis sjálvstøðugan eftirlitsstovn  eftirlit við, at lógarásett krøv verða hildin | | x | | | | |
| **Skúlastýri** | Skipa fyri skeiði fyri skúlastýrum í menning av virksemi teirra | x | | K | | | |
| | Um ikki eitt slíkt er frammanundan, eiga skúlastýrini á hvørjum skúla at taka stig til at skipa foreldraráð við umboðum frá hvørjum flokki við tí endamáli at styrkja tvívegis samskifti millum skúlastýrið og foreldur. | x | | | | | |
| | Næmingar eiga at vera umboðaðir í skúlastýrunum. Hetta vil styrkja ábyrgd og demokratisku siðvenju teirra, samstundis sum skúlin av røttum verður ávirkaður av sínum einasta sentrala brúkara. | | x | | | x | |
| **Skúla- og fólkabókasøvn** | Kommunurnar skulu hava fulla ábyrgd av skúlabókasavnsøkinum og fólkabókasavnsøkinum**.** | | x | K | K | | x |

# 2. Áðrenn skúlaaldur

Mentamálaráðið eigur at hava yvirskipaðu ábyrgdina av dagstovnaøkinum. Harvið hevur Mentamálaráðið ábyrgdina av børnunum frá vøggu til í minsta lagi eftir miðnám og kann soleiðist skipa læringina gjøgnum alla tilgongdina frá smábarni og skúlabarni til ungdóm.

## Fyrireiking til skúlabyrjan

Til tess at øll børn skulu fáa eina góða skúlabyrjan, er  avgerandi, at børnini eru væl fyrireikað at koma í skúla. Fyrireikingin eigur at byrja, áðrenn børnini koma í skúla, har serligur dentur eigur at verða lagdur á málmenningina hjá børnunum.
.Í fyrireikingini skal dentur eisini verða lagdur á leikur og mennandi spæl í eini ásannan av, at hetta eru grundleggjandi tættir í at virka, menna sín málførleika og at duga at vera saman við øðrum í einum felagsskapi.
Hetta krevur fleiri útbúnar pedagogar í dagstovnunum.

## Kanning (screening) av børnum undir skúlaaldur

Tað finst nógv tilfar at brúka til eygleiðingar av børnum undir skúlaaldur. M.a gera heilsusystrar eina kanning av øllum 8 mánaðar gomlum børnum (BOEL-kanningin) og eina kanning av 4- ára gomlum børnum. Sernámsdepilin ger somuleiðis eygleiðingar og kanningar av smábørnum, ið ikki mennast, sum tey skulu, og nakrir dagstovnar gera av sínum eintingum ymsar screeningar, serliga viðv. rørslu-, talu- og samskiftismenningini.

## TRAS (Tidlig registrering af sprogudvikling)

Mentamálaráðið/Sernámsdepilin  hevur tikið avgerð um, at Føroyar skulu uppí TRAS-arbeiðið. Í løtuni verður tilfarið umsett, síðani skulu allir dagstovnar hava skeið í, hvussu tað skal brúkast.

TRAS er ment í Noregi og verður brúkt í flestu Norðurlondum. Hetta er eitt  vælegnað eygleiðingartilfar at brúka fyri at fáa yvirlit yvir menningina hjá øllum børnum frá 2 ára-aldri. Ætlanin er, at tilfarið skal brúkast tvær ferðir á hvørjum aldursstigi: 2-3 ár, 3-4 ár, 4-5 ár, 5-6 ár. Pedagogarnir skulu nýta tilfarið í dagstovnunum í teirra arbeiði við at menna børnini og við at eygleiða tey við atliti at: almennari menning, samspæli við onnur børn og máli/talu.

Við TRAS fáa starvsfólkini í dagstovnunum eitt amboð til at lýsa:

- tað barnið megnar ella ikki megnar
- hvat stovnurin meira skal arbeiða við
- framgongdina, ið hevur verið
- hvørji stig eru neyðug at taka

Umframt at hetta  tilfar skal hjálpa starvsfólkunum í dagstovnunum til at seta skjótari inn við tiltøkum, ið kunnu menna barnið, har tørvur er, er tilfarið vælegnað til at brúka í samskiftinum við foreldur.

## Børn við serligum tørvi

Avvarðandi myndugleikar skulu við lóg hava skyldu til at samskipa stuðulsskipanir til børn við serligum tørvi til tess at skapa heild í tilveruna hjá barninum bæði undir og í skúlaaldri.

### Tilmæli:

- ***Lóggáva og yvirskipað umsjón á dagstovnaøkinum verður løgd til Mentamálaráðið***
- ***Skiftið úr barnagarði í skúla verður samskipað.***
- ***Kanningar og eftirmetingarskipanir verða gjørdar fyri øll børn undir skúlaaldri, so at menningin verður tryggjað, og at neyðug serhjálp kann verða givin, um tørvur er á tí.***

# 3. Skúlaárini – karmar um undirvísing

## Lækka skúlaaldur

Borið saman við skúlaskipanina í hinum Norðurlondunum eru fyrstu skúlaárini í Føroyum raðfest ov lágt. Børn í Føroyum fara í skúla 7 ára gomul. Í flestu Norðurlondum fara børn í skúla 6 ára gomul.

Mett verður, at tað er rætt at lækka skúlaaldurin, soleiðis at føroysk børn fara í skúla sum 6 ára gomul. Hetta krevur, at bæði skúli og lærarar verða tilbúnir at lyfta hesa uppgávu.

### *Tilmæli:*

- ***Frá 1. aug 2008 verður skúlaaldurin lækkaður, soleiðis at føroysk børn byrja skúlagongdina 6 ára gomul. Ásetta skúlatíðin er 10 ár.***
- ***Serlig undirvísingartilboð við øðrvísi innihaldi verða skipað eftir loknan 10. flokk.***

## Fleiri tímar til yngstu flokkarnar

Tímatalið í 1. flokki í Føroyum er 18 undirvísingartímar um vikuna. Í Danmark hevur 1. flokkur í minsta lagi 20 undirvísingartímar um vikuna, og í Íslandi er vikutímatalið í 1. flokkunum 26. Kommunurnar í Danmark og Íslandi kunnu sjálvar økja um vikutímatalið.
Í Føroyum kemur danskt aftrat í 3. flokki. Eftir hetta er tímatalið at kalla tað sama. Munurin í tímatalinum er serliga sjónskur í móðurmálsundirvísingini fyrstu skúlaárini.

### *Tilmæli:*

- 1. flokkur 25 tímar.
- 2. flokkur 28 tímar
- 3. flokkur 30 tímar

**Mannagongd í sambandi við økt tímatal**
1.aug 2007: fleiri tímar til 1., 2. og 3. flokk. Hesi hava longu stórt undirskot í undirvísingartímum, serliga í móðurmálinum, í mun til børn í grannalondunum.

- 1. flokkur 25 tímar. (hækking 7t: 2t n/t (afturat heimstaðarlæru), 4t føroyskt, 1 floksins tími)
- 2. flokkur 28 tímar (hækking 8t: 2t n/t (afturat heimstaðarlæru), , 1t rokning, 4t føroyskt, 1 floksins tími)
- 3.flokkur 30 tímar (hækking 6t: 2t n/t, , 1t rokning, 2t føroyskt, 1 floksins tími)

## Floksins tími:

Skipan við floksins tíma verður sett í verk. Ein tími verður á vikutímatalvuni øll skúlaárini. Flokslærarin umsitur floksins tíma saman við næmingunum. Hugsanin við floksins tíma er, at savnandi arbeiðið um flokkin verður avgreitt her. Hetta fatar m.a. um næmingaráð, foreldrasamstarv, serlig tiltøk, trupulleikar o.a. Hetta hevur við sær, at flokslærarauppgávan ikki tekur burtur av dagligu undirvísingini.

### *Tilmæli*

- ***Fra 1. august 2007 verður ein vikutími settur av til floksins tíma í øllum árgangum***

## Styrkja náttúruvísindaligu lærugreinirnar

Krøvini til náttúruvísindaligu lærugreinirnar eru stór. Pisakanningin staðfesti, at førleikin hjá næmingunum í náttúruvísindaligu lærugreinunum er serliga vánaligur. Neyðugt er tí við tiltøkum á hesum økinum beinanvegin.

Náttúra og tøkni er rættiliga nýggj lærugrein, sum er á tímatalvuni í 4., 5. og 6. flokki. 3 undirvísingartímar eru um vikuna. Alis- og evnafrøði er á tímatalvuni í 7., 8. og 9. flokki. 2 undirvísingartímar eru um vikuna. Samlaða tímatalið í náttúru og tøkni og alis- og evnafrøði er lágt í Føroyum. Alis- og evnafrøði er valfak í 8. og 9. flokki.

Betri møguleikar eiga at verða fyri at draga virksemi í samfelagnum inn í skúlan fyri at skapa fjøllbroytni og forvitni í undirvísingartilfari og undirvísingarhættum. Eitt gott dømi um hetta er Danfoss Univers í Danmark, sum ikki leggur dent á paratvitan, men á at skapa fatan fyri náttúruvísindaligu fakunum.

Fleiri stovnar í Føroyum hava beinleiðis tilboð til fólkaskúlan innan føroyska náttúru og mentan. Á Náttúrugripasavninum, Jarðfeingi og Fornminnissavninum eru slík tilboð lógarkravd fyri virksemið í stovninum. Á hesum landsstovnum eru umfatandi søvn, framsýningar og sakkunnleikir. Hesi tilboð eiga at mennast við tí endamáli at vera íkast til at styrkja m.a. náttúruvísindaligu lærugreinirnar í skúlanum.

Somuleiðis eiga vit at skapa fora og styrkja ítøkiliga samstarvið við vinnulív og granskingarumhvørvi í Føroyum, so næmingar og lærarar støðugt hoyra og læra um úrslit og avrik. Hetta kann gerast á ymsan hátt, eitt nú við verkætlanum, har serkunnleiki kann luttaka, og við at foreldur koma inn á skúlan at greiða frá, fyri bert at nevna okkurt dømi.

### *Tilmæli*

- ***Náttúra- og tøkni kemur á tímatalvuna við 2 undirvísingartímum um vikuna úr 1. flokki og upp í 6. flokk.***

- ***Alis- og evnafrøði verður kravd lærugrein í 7., 8. og 9. flokki við trimum undirvísingartímum um vikuna.***

- ***Skipað verður eitt undirvísingarforum, sum verður mannað av fólkum frá viðkomandi stovnum, umboðum fyri skúlaleiðslur og foreldrefelagnum Heim og Skúli.***

## Felags mál í lesiætlanum

Fyri at tryggja at næmingar, óansæð hvar í landinum teir búgva, fáa møguleika fyri at ogna sær sama kunnleika og fimi, má ein felags lesiætlan gerast, sum lýsir málini, ið røkkast skulu á ymsu stigunum.
Henda lesiætlan skal tryggja fakliga støði í fólkaskúlanum. Mállýsingarnar í hesari lesiætlan skulu harafturat hjálpa lærarum, foreldrum og næmingum at geva gætur, um ein næmingur hevur brúk fyri størri avbjóðing, stuðli ella serstøkum umhugsni. Málini gerast á henda hátt eitt amboð, ið fremur næmingalagaða undirvísing.
Øll, ið hava børn í skúlanum, skulu kunnu fáa sær vitan um, hvørjum málum arbeitt verður fram ímóti.
Endamálið við felags lesiætlan eigur at vera, at tað verður møguligt at fylgja tilgongdini hjá næmingum at ogna sær vitan, líka frá fyrsta degi í skúlanum og til teir fara úr skúlanum.

Fólkaskúlalógin er tann yviskipaði karmurin fyri, hvussu skúlin tekur atlit at tí einstaka næminginum. Skúlin skal í samstarvi við foreldrini fremja, at næmingarnir nema sær kunnleika, fimi, arbeiðshættir og málbúnar, sum stuðla tí einstaka næminginum í fjølbroyttu, persónligu menningini.

Trinmálini í felags lesiætlanini eru stutt tíðar mál, sum vera nýtt í fyrireikingini, ætlanini og eftirmetingini av undirvísingini. Tey kunnu geva lærarum eina greiða og týðiliga mynd av, hvat næmingarnir skulu læra, uttan at siga á hvønn hátt. Trinmál og endamál eru samstundis eitt samrøðuamboð millum lærara og næming, lærarar sínámillum, millum skúlaleiðslu og toymi og millum skúla og heim.

Læriætlanin skal vísa, hvussu einstaki skúlin arbeiðir fyri at náa endamálunum í tí felags lesiætlanini. Henda læriætlan skal siga, hvussu skúlin arbeiðir, um hann arbeiðir floksvís, við bólkum, verkætlanum, evnisarbeiðum, tvørfloksliga ella við øðrum hættum. Læriætlanin skal eisini vísa, á hvønn hátt skúlin tekur atlit at persónliga førleikanum og menningini hjá tí einstaka næminginum. Somuleiðis skal læriætlanin siga, hvønn eftirmetingarhátt skúlin vil nýta, og hvussu ofta.
Í læriætlanini hevur skúlin eisini innarbeitt virðisgrundarlagið hjá skúlanum; har eru menningarætlan og atferðarreglur, ið skúlastýrið saman við skúlanum hevur samtykt.
Í læriætlanini eru trinmálini gjølla lýst. Har stuðul og onnur hjálp er neyðug, skal læriætlanin siga, á hvønn hátt skúlin tekur atlit at einstaka næminginum, og hvussu hetta arbeiði verður lagt til rættis.

Við støði í læriætlanini verða ársætlanir gjørdar. Tær siga neyvt, hvussu hvør lærari skipar sína undirvísing fyri at náa tí ásetta málinum í lesiætlanini. Her stendur eisini, hvat tilfar og hvørji amboð verða nýtt, nær eftirmett verður og hvussu.
Ársætlanirnar lýsa eisini, hvussu arbeitt verður í flokkinum við trivnaði, felagsátøkum, skeiðum av ymiskum slagi, setursskúlum og útferðum, og hvat foreldrabólkurin kundi hugsað sær sum trivnað í flokkinum. Hesar ársætlanir savnar flokslærarin og handar leiðsluni innan 1. september.

## Skúlaleiðsla

Tað er umráðandi, at leiðslan hevur tíð til sítt arbeiði og møguleikar til leiðslumenning. Skúli í ávísari støddeigur at hava skrivstovuhjálp.

Leiðslan má vera sjónlig og hava greið námsfrøðilig sjónarmið, sum verða framd í verki í samstarvi við starvsfólk, næmingar, foreldur og avvarðandi myndugleikar. Leiðslan skal hava greiðar heimildir at arbeiða eftir í starvsfólkamálum.

Har einalærari ella fyrstilærari er, eigur greið mannagongd at vera um, hvør avloysir, tá viðkomandi er burtur.

### *Tilmæli:*

- ***Útbúgving og eftirútbúgving til skúlaleiðslu***
- ***Betri tíð til leiðslu***
- ***Skúlar í ávísari stødd skulu hava skrivstovufólk***

## Lærarin

Skipanin við eindarlærara er gomul í Føroyum. Fakligu krøvini í dagsins skúla hava við sær, at møguligt er ikki hjá læraranum at vera serfrøðingur í øllum fakum. Skipanin við eindarlæraranum má tí verða endurskoðað.

Fakliga og námsfrøðiliga støðið hjá føroyskum fólkaskúlalærarum má verða styrkt. Eingin skipað eftirútbúgving er, og tí er ógvuliga ymiskt, hvussu fakliga og námsfrøðiliga støðið verður uppfylt, sum er.

Krøvini til eftirútbúgving eru alsamt økt seinnu árini, og henda gongd fer at halda fram. Umframt at styrkja læraraútbúgvingina og uppstiga hana til bachelor, má skipað eftirútbúgving verða sett í verk.

### *Tilmæli:*

- ***Lærarar taka linjulestur á Læraraskúlanum. Alt tað ber til, eiga lærarar bara at undirvísa í sínum linjugreinum.***
- ***Eftirútbúgving verður samskipað við støði í gransking, kanningum og nýggjastu námsfrøðiligu rákunum bæði í Føroyum og úti í heimi.***

## Stuðul til næmingar

Tímarnir, ið skúlarnir fáa tillutaðar, nøkta ikki tørvin til serundirvísing.

Stuðulsundirvísing skal samskipast, so næmingur, ið hevur tørv á eykahjálp í ávísum lærugreinum, kann fáa høvi í styttri ella longri tíð at fáa nágreiniliga og skipaða undirvísing. Hetta *kann* vera best uttan fyri teir vanligu tímarnar, men eigur ikki at vara allan tíman. Avtala skal gerast, so tá næmingurin er úti frá flokkinum, hendir ikki annað enn avtalað undirvísing.

Ein av fyritreytunum fyri at kunna geva eina góða og holla undirvísing er, at undirvísingarfriður er í tímunum. Sambært upplýsingum frá næmingum í PISA-undankanningini, er tað ikki nóg góður undirvísingarfriður í nógvum skúlum.. Allir skúlar skulu hava skipaðar reglur um góðan atburð og arbeiðsfrið í skúlunum, sum foreldrini skulu hava kunning um. Í reglunum skal greitt vera ásett, hvørju tiltøk skúlin setur í verk, um so er, at næmingurin órógvar so mikið í tímunum, at tað ikki er undirvísingarfriður.
Eitt hugskot var at gjørt sum í Finnlandi. Har verða pedagogar settir sum hjálparar í skúlanum. Hesir hjálpa lærararnum í tímanum, hjálpa til í fríkorterinum, hjálpa næmingum við skúlatingum og eru knýttir at frítíðarskúlanum. Við at hava slíka hjálp, fær lærarin tíð til sjálva undirvísingina í lærugreinunum.

### *Tilmæli:*

- ***Serlig tilboð skulu vera til atferðartruplar næmingar.***
- ***Økt tímatal til serundirvísing***
- ***Pedagogar kunnu setast at taka sær av ávísum uppgávum***

## Foreldur

Foreldur og familja eru fyrstu og fremstu lærararnir hjá barninum . Henda vitan byggir á granskingarúrslit í nógvum londum, eitt nú úr Noreg, Danmark, Onglandi og USA (OECD, 1997), og henda vitan er av allarstørsta týdningi at breiða út millum øll tey, sum varða av skúlanum (Nordahl, 2000).

Granskingarúrslitini vísa, at heimið hevur størri ávirkan á avrikið hjá barninum enn skúlin, og sostatt at stórir menningarmøguleikar hjá skúlanum liggja í at draga foreldrini uppí á rættan og skilagóðan hátt (Desforges, 2003).

Til dømis vísa kanningarnar ein samanhang millum dugnaligar næmingar og vælútbúgvin foreldur, meðan enn størri samanhangur er millum dugnasemi hjá næminginum og møguleikarnar hjá barninum at samrøða við áhugað vaksin í heiminum (Birkemo, 2002). Neyðugt er sostatt sum skjótast at seta orð á, hvønn leiklut foreldur hava fyri innlæringina hjá skúlabarninum.

Foreldur eiga at fáa ein størri leiklut í skúlagongdini hjá barninum, at vera við til at seta krøv til málsetning hjá barninum fyri innlæring og seta størri krøv til skúlan. Í hesum eigur dentur at vera lagdur á dygd í innlæring.

Skipað verður fyri royndartiltøkum á ymsum skúlum við floksráðum við 2 foreldrum, flokslærara og 2 næmingum, eins og gjørt verður í t.d. Danmark og Noregi.

Arbeiðssetningurin hjá floksráðnum skal vera ítøkiligur og skal miða eftir at hækka fakliga støðið í flokkinum. Hetta kundi verið samskipað við floksins tíma.

Royndartiltøk av slíkum slagi kundu til dømis byrja i 1.flokki, og í 6. floks árganginum, sum skal til næstu PISA-kanning um 3 ár. Royndartiltøkini skulu skjalprógvast og skipast á ein hátt, so úrslitini eru atkomilig hjá øllum áhugaðum.

***Tilmæli:***

- ***Seta í verk royndartiltøk á ymsum skúlum, sum vísa á/finna hóskandi hættir í føroyska skúlanum at styrkja foreldrasamstarvið***

- ***Floksráð við t.d. 2 foreldrum, flokslærara og 2 næmingum, eins og gjørt verður í t.d. Danmark og Noregi.***

# Lesing

Lesiførleiki er støðið undir øllum hinum lærugreinum skúlans. Góður lesiførleiki er avgerandi fyri at kunna nema sær annan kunnleika og fáa íblástur til at læra. Líka týdningarmikið er tað at kunna uppliva gleðina við at lesa og at verða burtur í bókum.

Tað er av stórum týdningini, at byrjanin av innlæringini í lesing og skriving er væleydnað. Kanningar í øðrum londum vísa, at alt ov ofta verða teir næmingar, ið hava havt eina vánaliga lesibyrjan, veikir lesarar alla skúlatíðina. Ongar kanningar eru her hjá okkum um lesiførleikan hjá næmingum.

Við at byggja á tann málsliga førningin, børnini hava fingið í dagstovnum og heimanífrá, skal lesiundirvísingin beinanvegin, næmingurin er komin í skúla, geva honum

- hug til at lesa og skriva
- góðar lesi- og skriviførleikar
- góðar lesimátar
- góðar lesivanar
- og seta í verk eina livandi lesimentan, ið førir til vitan og upplivingar

Endamálið eigur at vera, at fægst møgulig skulu hava tørv á serhjálp í teirra lesimenning. Men hjá teimum, ið hava ein tørv, skal setast inn beinanvegin við lesistuðli í 30 minuttir hvønn dag í upp til 20 vikur á lesiskeiði. Næmingar, ið eftir hetta ikki megna at fylgja vanligu undirvísingini í lesing, verða tilmeldaðir serundirvísing.

## Alment lesiátak

Hugurin at lesa eigur at verða styrktur munandi. Allar royndir vísa, at tað styrkir lesiførleikan hjá børnum og seinni lesihugin, verður lisið fyri teimum, meðan tey eru smá. Tí mugu foreldur og pedagogar lesa nógv fyri børnum.

Í skúlanum eigur munandi dentur at verða lagdur á lesing. Økt tímajáttan í føroyskum fyrstu skúlaárini eigur at vera nýtt til skipaða lesing, so at førleikin verður styrktur.

Í hsum sambandi má bókaútgávan á føroyskum verða endurskoðað. Dygdargóð undirvísing á móðurmálinum kann bara vera framd við fyrstafloks føroyskum undirvísingartilfari.

Lættlesibøkur, sum eru serliga væl egnaðar til ungu lesararnar, eiga at vera givnar út so at okkara ungu kunnu lesa um viðkomandi daglig viðurskifti á føroyskum og ikki mugu leita til onnur mál. Føroyskt undirvísingartilfar má vera líka gott sum annað.

Lýsingarátak í fjølmiðlunum eigur at vera fyriskipað, so at børn, ung og vaksin støðugt vera eggjað at lesa sum mest.

## Lærarin í føroyskum

Uppgávan hjá lærararanum í føroyskum í mun til lesimenning floksins er at taka ábyrgd fyri, at lesiførleikin hjá einstaka næminginum er á einum støði, ið er aldurssvarandi. Lesing mennist í øllum lærugreinum, men lærarin í føroyskum hevur eina serliga ábyrgd fyri at menna lesiførleikan hjá næminginum. Lærarin kann í hesum sambandi søkja sær ráð hjá lesivegleiðara skúlans (lesivegleiðarin er ein lærari, ið hevur servitan og áhuga fyri undirvísing í lesing og skriving), serlæraranum ella lesiráðgevanum í SND. Lærarinum í føroyskum eigur at standa í boði eftirútbúgving í lesiundirvísing.

Lærarin eigur at taka atlit at menna lesingina øll árini, næmingurin gongur í skúla, soleiðis at næmingurin eftir loknan fólkaskúla dugir:

- at brúka ymsar lesihættir
- at lesa skjótt (skimma)
- at skriva viðmerkingar til tað lisna
- at skilja millum at lesa fagrar bókmentir og yrkisbókmentir
- lestrarteknikk

## Foreldur og avvarðandi

Foreldrini ella tey nærmastu eiga at verða kunnað um týdningin av, at nógv verður lisið og tosað við næmingin. Hetta eigur at verða gjørt heilt frá, at børnini eru smá. Foreldrini eiga at venja børnini til at gera brúk av bókasøvnunum við at fara við teimum, bæði til tey tiltøk, bókasøvnini skipa fyri, og fyri at læna ymsar bøkur, bæði til upplestur og til at tosa útfrá.
Foreldur mugu kenna ábyrgd av, at næmingur gera sín heimasetning. Somuleiðis skulu tey syrgja fyri, at í skúlataskuni er tað tilfar og tey amboð, næmingurin skal brúka.

## Skúlabókasøvn

Úrslitið av PISAundankanningini í 2005 vísti , at næmingarnir í føroysku skúlunum lesa ov lítið. Kanningin vísti eisini, at næmingarnir nýta bókasøvnini minni enn aðrastaðni. Orsøkirnar kunnu vera nógvar. Kanska hava skúlabókasøvnini ov lítið og ov vánaligt tilfar; kanska eru upplatingartíðirnar ov stuttar, ella hóska tær ikki til næmingarnar. Kanska eru næmingarnir ikki nóg væl kunnaðir um skúlabókasavnið og virksemið hjá tí; kanska er skúlabókasavnið staðsett óhøgligt. Kanska verður skúlabókasavnið í ov lítlan mun tikið við sum ein partur av undirvísingini.

Um trupulleikin er, at ov lítið tilfar er á føroyskum til teir ymsu aldursbólkarnar (kyn kann eisini hava týdning), so munar ein størri játtan til skúlabókasøvnini ikki; tá er betri at stuðla útgávuvirksemi o. tíl.
Virksemið hjá skúlabókasøvnunum kundi verið økt og gjørt sjónligari. Sambært løgtingslóg nr. 148 frá 20. desember 2005 skal skúlabókasavnið vera ein ”námsfrøðiligur tænastudepil” (§17).
Skúlabókasavnið skal vera eitt stað, har næmingar kundu leitað sær vitan og kunnleika, har teir kundu arbeitt við verkætlanum og øðrum skúlaarbeiði, har teir kundu lisið eina góða bók í friði og náðum, har teir kundu samskift og hugnað sær við t.d. spølum.

Sambært PISA-undankanningini vóru næmingarnir í Føroyum væl fyri í KST. At ogna sær kt-førleika eigur at vera eins sjálvsagt og tað at læra at lesa, skriva og rokna.
Tey trý hegnini at duga at lesa, skriva og at rokna verða rópt mentanarhegni. Hesi seinastu árini er roknað við einum nýggjum mentanarhegni. Tí fjórða. fjórða mentanarhegni er kunningartøkni.
Umframt at kunningartøknin víðkar um innihaldið í verandi mentanarhegnum, so kann hon eisini fatast sum fjórða mentanarhegni.
Tey, sum duga fjórða mentanarhegni, hava førleika til at nýta kst, tá ið tað er hóskandi. Tey hava grundleggjandi fatan av, nær og í hvørjum førum tað loysir seg at nýta kt og nær, tað er best at lata vera.
Góður kst-førleiki er tó treytaður av, at góður telduútbúnaður og undirvísingarførleiki í kst er til taks á øllum skúlum.

Tað er týdningarmikið at fáa staðfest, hvussu stóran týdning bókasavnið og námsfrøðiligi tænastudepilin (vitanardepilin) hevur kanska serliga í mun til lesing ítøkiliga, og at politiska/fíggjarliga raðfestingin verður at samsvara hesum.

## Bókaútgáva

Sambært einum yvirliti, sum er gjørt av Føroya Skúlabókagrunni, so vantar hóskandi, nútímans undirvísingartilfar í so at siga øllum lærugreinum, bæði í fólkaskúlanum og í miðnámsskúlunum.

Til er nógv tilfar, sum, um tað varð skipað, kundi verið nýtt sum undirvísingartilfar, men fíggjarlig orka er ikki til at gera hetta. Einasta gongda leið er ein styrktur bókaútgávupolitikkur.

***Tilmæli:***

- ***Fleiri tímar eiga atverða settir av til føroyskt á tímatalvuni fyrstu árini í skúlanum***
- ***Hvønn dag eiga allir næmingar at lesa í 20 minuttir í skúlanum. Næmingar í 1. og 2. flokki eiga somuleiðis at skriva hvønn dag í 20 minuttir***
- ***Á hvørjum flokksstigi verður skipað fyri lesiskeiðum, lesidøgum ella -vikum, har innihaldið er tillagað eftir, hvørjum lesistigi næmingurin er á.***
- ***Á hvørjum flokksstigi verður ráðlegging í lesing um hvønn einstaka næming við støði í kanningum og eygleiðingum, ið serlærarin/lærarin í føroyskum hevur gjørt.***
- ***Longri upplatingartíðir til skúlabókasavn***
- ***Skipað verður fyri almennum lesiátaki***
- ***Bókasavnsnýtsla gerst ein partur av lesiætlanini í flestu lærugreinum.***
- ***Bókasøvnini skulu vera ein sjónligur partur av almenna lesiátakinum.***
- ***Økt játtan til bókaútgávu***
- ***Nútímans telduútgerð í skúlunum***
- ***Styrkja telduførleika lærarana***

# Eftirmeting

## Full eftirmetingarskipan

Mælt verður til at seta í verk fulla eftirmetingarskipan fyri føroyska skúlaverkið.

Tað tekur tíð at byggja upp mannagongdir á øllum økjum, men byrjast kann á úrvaldum økjum beinanvegin. Tað greiða málið eigur at vera, at føroyska skúlaverkið hevur fulla eftirmetingarskipan um 3 ár.

Eftirmeting er avgerandi fyri at kunna fylgja við og menna undirvísingina. Ymsu partarnir hava brúk fyri ymsum sløgum av eftirmeting. Hjá skúlamyndugleikum, politikkarum og skúlaleiðslu skal eftirmeting skipast soleiðis, at hon gevur leypandi, ítøkiligar og brúkiligar upplýsingar um gongdina, góðsku og neyðug innsatsøki í hvørjum einstøkum skúla sum heild. Hjá lærarum, næmingum og foreldrum skal eftirmeting vera eitt amboð í gerandisdegnum í sjálvari lærutilgongdini.

Tann fulla eftirmetingarskipanin umfatar partar sum t.d.:

- **Málseting og eftirmeting av læringarmálum hjá einstaka næminginum**, sum næmingur, lærarar og foreldur arbeiða við. Hetta verður gjørt 2 ferðir árliga: við skúlaársbyrjan og mitt í skúlaárinum.
- **Eftirmeting av ítøkiligum innihaldi og dygd í undirvísing og undirvísingartilfari**, sum næmingar, lærarar og foreldur arbeiða við. Hetta verður gjørt 2 ferðir árliga: við skúlaársbyrjan og mitt í skúlaárinum.

- **Landsroyndir**, har næmingar o.o. fáa eitt einfalt úrslit fyri síni avrik, tá ið lærutilgongdin er liðug. Hetta kemur, tá ið læringartíðarskeiðið er liðugt, og er tí ov seint og lítið brúkiligt hjá næminginum í sjálvari lærutilgondini, men hetta er neyðug vitan fyri at meta um heildarúrslit hjá skúla og samfelag.
- **Støðuroyndir,** sum skulu kunna lofta teimum næmingum, sum av eini ella aðrari orsøk ikki eru á tí undirvísingarliga støði, teir áttu at verið á, so teir skjótt kunnu fáa eina eykaundirvísing og koma á ta støði, sum kravt verður av teimum
- **Altjóða royndir**, har næmingur einki egið úrslit sær yvirhøvur. Eisini hetta er til lítið gagn fyri einstaka næmingin, men hevur stórt virði sum samanberingaramboð hjá skúlamyndugleikum og samfelag.

Øll eftirmeting skal byggja á opinleika og virðing fyri fjølbroytni hjá pørtunum. Øll eftirmeting skal vera skrivlig og hava tað greiða endamál, at hon skal nýtast til framhaldandi menning. Tað er av allarstørsta týdningi at laga eftirmetingina væl, tí hon gerst lættliga stýrandi fyri sjálva lærutilgongdina.

## Næmingaeftirmeting

Mælt verður til at styrkja skipanina við málseting og eftirmeting fyri allar skúlar.
Slíkar skipanir vera nýttar í hinum Norðurlondunum. Í Grønlandi hevur slík skipan virkað í 5 ár, og bæði næmingar og foreldur eru væl nøgd. Í Danmark er ein slík skipan sett í verk fyri alt landið í ár, og undirtøkan er vaksandi. Hon kallast har ”elevplan”. Lærarar, sum arbeiða við hesi skipan, boða frá, at hetta er arbeiðskrevjandi ta fyrstu tíðina, og neyðugt er at seta nógva tíð av til hetta. Henda íløga kemur væl aftur, tí partarnar kenna stórt gagn av, at mál og lutmál, dygdir og menningarmøguleikar hjá einstaka barninum við hesum gerast skrivlig og ítøkilig fyri næmingin, foreldrini og skúlaleiðslu. Við slíkari skipan kann næmingurin í nógv størri mun gerast tilvitaður um egna læring, og foreldrini hava fyri fyrstu ferð nógv størri møguleikar at finna sín leiklut í at stuðla læringini hjá barninum.

Ein annar fyrimunur, sum eisini hevur víst seg, er, at yrkisligu dygdirnar hjá lærarunum koma sterkari til sjóndar bæði yvirfyri næminginum og foreldrunum. Royndirnar hava víst, at ein tílík skipan er við til at styrkja menniskjaligu og yrkisligu virðingina fyri lærarunum, og hon gevur eisini bæði skjótari og betri grundaðar møguleikar fyri at seta í verk tiltøk fyri næmingar, vegna fakligan veikleika, styrki ella óhóskandi atburð.

## Landsroyndir

Umframt fráfaringarroyndirnar skulu landsroyndir í føroyskari rættskriving, støddfrøði, lesiførleika og náttúrulærugreinum setast í verk í 4. og 6. fl. Hesar royndir skulu vera dygdarroyndir og skulu gerast í øllum fólkaskúlum. Royndirnar skulu geva næmingum, lærarum, foreldrum og myndugleikum upplýsing um fakliga støði, trivnaður, arbeiðslag o.a. í skúlunum, og skulu vera grundarlag fyri at betra um undirvísingarliga støðið í fólkaskúlanum.

Royndirnar skulu tryggja, at næmingarnir hava nátt málunum, sum eru ásett í lesiætlanunum fyri ávísu stigini, og eru námsfrøðiligt amboð hjá skúlunum í royndunum at hækka støðið í undirvísingini.

## Støðuroyndir (diagnostiskar royndir)

Eftirmeting má gerast ein týðiligur partur av skúladegnum, skilt soleiðis, at tey mál, sum skúlin setir fyri árgangin og tann einstaka næmingin, verða eftirmett, so skjalprógv er. Hetta skjalprógv er grundarlag fyri skúla/heim samtalum.

Álagt skal verða øllum skúlum at skipa fyri eini standardiseraðari støðuroynd av undirvísingini í 2.-, 4.- og 6. flokki. Royndirnar, sum skulu gerast á teldu, skulu vera í føroyskum og støddfrøði og skulu bert nýtast av lærarum til at eftirmeta undirvísingina í hesum lærugreinum. Royndirnar skulu kunna lofta teimum næmingum, sum av eini ella aðrari orsøk ikki eru á tí undirvísingarliga støði, teir áttu at verið á, so teir skjótt kunnu fáa eina eykaundirvísing og koma á ta støði, sum kravt verður av teimum. Tá sett verður inn við eykaundirvísing so skjótt sum gjørligt, verður tørvurin á varandi serundirvísing ikki eins stórur, og hann vildi verið, um bíðað verður til næmingurin hevur verið til kravdu kanningarnar fyri at móttaka serundirvísing.

Slík skipan kann, saman við regluligu eftirmetingini hjá skúlunum, geva lærarunum betri amboð í sambandi við leiðbeining og at ráðleggja komandi undirvísing, og vera liður í eini betri kunning til foreldrini um støðuna hjá næmingunum.

### *Tilmæli:*

- ***Sett verður í verk full eftirmetingarskipan fyri føroyska fólkaskúlan***

# 4. Kanningar av undirvísing

Vit seta broytingar í verk, men vita lítið um, hvørt hesar koma skúlum, næmingum og lærarum til góðar ella ikki. Tí er umráðandi, at broytingar verða eftirmettar og fylgt verður við, hvussu tær hava roynst.

Til tess at bøta um hetta, eiga vit at fara undir granskingarverkætlanir, sum hava til endamáls:

- at kanna undirvísingina og lýsa effektivu undirvísingarstøðuna
- at nýta hesa vitan, bæði í sambandi við framtíðar broytingar í skúlaverkinum og í undirvísingini av komandi lærarunum

Slíkar kanningar verða gjørdar t.d í Noregi undir leiðslu av lærdu háskúlunum m.a. í Oslo. Hesar kanningar vísa, at sjálvt um nógv arbeiði hevur verið gjørt á fyrisitingarligum stigi til tess at betra um dygdina í undirvísingini, so er tað ógvuliga avmarkað, í hvønn mun hetta sæst aftur í ítøkiligu undirvísingini í skúlanum.

Tað er umráðandi at skilja, hvar vit eru júst nú, soleiðis at menningartiltøk vera sett inn grundað á vitan og ikki gitingar. Tí er neyðugt at kanna undirvísingina í øllum føroysku skúlunum. Norska skipanin, KOSTRA (Kommunal- og regionaldepartementet, 2006), er eitt gott dømi um, hvussu slíkar kanningar gerast eitt virðismikið amboð fyri allar partar, bæði lærarar, næmingar, foreldur, skúlamyndugleikar og kommunalpolitikkarar. Ein slík kanning eigur at leggja dent á at kanna hvønn einstakan skúla eftir ávísum indikatorum, sum greiða er um frammanundan. Kanningin eigur eisini at lýsa skúlamentanina, umfata class-room observation, týdningin av foreldrum fyri innlæring hjá næmingum og nøgdsemiskanning.

Tað er umráðandi, at ein slík kanning gerst eitt evalueringsamboð fyri komandi broytingar. Tær broytingar og tiltøk, sum eru sett í verk, - hava tey havt ta ynskiligu ávirkanina. Føroyski fólkaskúlin er ein fjøllbroyttur og kompleksur partur av føroyska samfelagnum, og verður ein variabul broyttur, kann tað fáa óvæntaðar avleiðingar á aðrar partar. Neyðugt er at fylgja við í hesum.

Við tí í huga, at Læraraskúlin verður lagdur undir Fróðskaparsetrið, so er tað upplagt, at hesir stovnar standa fyri kanningararbeiðinum, og at tað verða starvsfólk á Fróðskaparsetrinum/Læraraskúlanum við granskingarførleika, sum koma at gera hetta arbeiðið, og á henda hátt menna bæði vitanarstøði og granskingarførleika. Tað er umráðandi, at kanningarnar vera brúktar til menning av hvørjum einstøkum skúla. Analyseraðu kanningarúrslitini skulu almannakunngerast.

Á henda hátt ber til at fáa til vega meira vitan og kunnleika um ítøkiliga undirvísing, samstundis sum hesin kunnleiki kann nýtast í undirvísingini av komandi lærarum á Læraraskúlanum.

Landsmiðstøðin er ráðgevandi í undirvísingartilfari og skal harumframt vera ígongdsetari í sambandi við námsfrøðiligari menning í skúlunum.

Lærugreinaøkið skal verða raðfest hægri, soleiðis at høvuðsarbeiðið hjá lærugreinaráðgevunum verður í Landsmiðstøðini. Lærugreinaráðgevin skal vera samskipandi fyri alt landið fyri sítt lærugreinaøki.

## *Tilmæli:*

- ***Seta í verk kanningar og granskingarverkætlanir av føroyskum skúlum og undirvísing í samstarvi við útlendskar granskarar.***

- ***Læraraskúlin og Fróðskaparsetrið skulu luttaka í kanningar-/granskingararbeiðinum, og starvsfólk frá hesum stovnum skulu í mest møguligan mun gera hetta arbeiðið.***

- ***Meginfyrisitingin av skúlaverkinum verður kannað av altjóða serfrøðingum t.d. OECD-serfrøðingum***

- ***Landsmiðstøðin skal vera fakligur og námsfrøðiligur kveikjari. Høvuðsarbeiðið hjá lærugreinaráðgevunum verður í Landsmiðstøðini. Lærugreinaráðgevin skal vera samskipandi fyri alt landið fyri sítt lærugreinaøki.***

# 5. Ábyrgdarbýtið millum land og kommunu

Ábyrgdin fyri fólkaskúlan skal liggja hjá einum og sama myndugleika, bæði viðvíkjandi bygningum, undirvísingartilfari og undirvísarum. Fólkaskúlin eigur at vera ábyrgd hjá kommununum. Umsitingarligu uppgávurnar í sambandi við fólkaskúlan, sum í dag eru í Mentamálaráðnum, verða lagdar út til kommunurnar at umsita eftir tí leisti, sum Innlendismálaráðið mælir til í uppskoti um nýggja lóg um sjálvbodna kommunusamanlegging.

Mentamálaráðið skal standa fyri lógarfyrireikandi arbeiðinum, áseta krøv, hava eftirlit við lógum og reglum, skipa fyri eftirmetingum og kanningum, geva íblástur til menningarætlanir og átøk v.m.

Við at leggja umsitingina av skúlanum út til kommunurnar verður somuleiðis komið burtur úr tí óhepnu skipan, at Mentamálaráðið bæði er eftirlitsmyndugleiki/ kærumyndugleiki og umsitingarmyndugleiki.

Tá ið Mentamálaráðið hevur yvirskipaðu ábyrgdina bæði á dagstovnaøkinum og skúlaøkinum, og kommunurnar umsita bæði hesi øki, so er so mikið lættari at gera skipanir og loysnir fyri ansing, menning og læring, sum røkka yvirum markið millum dagstovn og skúla. Í hesum sambandi eigur frítíðarskúlin at verða integreraður partur av fólkaskúlanum.

### *Tilmæli:*

- ***Eintýðug avgerðar- og fíggjarábyrgd millum land og kommunur***
- ***Kommunurnar skulu umsita fólkaskúlan – skipað útleggingartilgongd verður sett í gongd sum skjótast, har treytir, krøv, fígging v.m. verða ásett***
- ***Mentamálaráðið hevur ábyrgdina av lógum, reglum og krøvum til kommunurnar og skúlan annars, og hevur antin sjálvt ella umvegis sjálvstøðugan eftirlitsstovn eftirlit við, at lógarásett krøv verða hildin***

## Skúlastýrið

Skúlastýrini hava møguleika at ávirka karmin fyri hvønn einstakan skúla, og við hesum eru skúlastýrini m.a. amboð til at styrkja sambandi millum foreldur og starvsfólk í skúlanum og kommunalu myndugleikarnar um skúlaskap.

Starvsfólkaumboðið og skúlastjórin sum skrivari í skúlastýrinum tryggja samstarvið millum skúlastýrið og starvsfólk. Teir báðir kommunustýrislimirnir í skúlastýrinum tryggja tvívegis samstarvið millum skúlan og bý- ella bygdaráðið. Báðir hesir nevndu partar hava eitt upplendi at samskifta við. Tann parturin, sum kann styrkjast munandi, er sambandið millum skúlastýrið og foreldur og næmingar. Á nógvum skúlum í landinum finst ikki eitt forum, har foreldur og skúlastýrið javnan hittast, eins og hjá starvsfólkum og kommustýrislimum. Hetta ger tað trupult at skapa støðugt samskifti og mennandi samstarv.

Ásannandi, at foreldrasamstarvið er avgerandi fyri læringina hjá barninum, eigur ein týdningarmikil ábyrgd hjá skúlastýrunum komandi tíðina at liggja í at styrkja samstarvskarmarnar hjá foreldrum í skúlanum. Hetta kann t.d. gerast við at skipa foreldraráð og onnur samstarvsgøgn, sum kunnu vera við til at styrkja tvívegis samstarvið millum skúlastýri, foreldur og næmingar.

### *Tilmæli:*

- ***Skipa fyri skeiði fyri skúlastýrum í menning av virksemi teirra***

- ***Um ikki eitt slíkt er frammanundan, eiga skúlastýrini á hvørjum skúla at taka stig til at skipa foreldraráð við umboðum frá hvørjum flokki við tí endamáli at styrkja tvívegis samskifti millum skúlastýrið og foreldur.***

- ***Næmingar eiga at vera umboðaðir í skúlastýrunum. Hetta vil styrkja ábyrgd og demokratisku siðvenju teirra, samstundis sum skúlin av røttum verður ávirkaður av sínum einasta sentrala brúkara.***

## Skúla- og fólkabókasøvn

Sambært PISA-undankanningini brúka skúlanæmingar skúlabókasavnið ov lítið.
Skúlabókasøvnini verða fíggjað við lands- og kommunustudningi (60% og 40%), skúlabókavørðirnir eru lærarar, sum fáa tímaniðurskurð fyri at hava ábyrgdina av skúlabókasavninum. Fólkabókasøvnini verða fíggjað við studningi frá landinum upp til 40%, meðan kommunurnar fíggja restina.

Hetta ógreiða ábyrgdarbýti er ikki fremjandi fyri menning av samlaðu bókasavnstænustuni. Bókasavnsøkið eigur tí at verða undir fullari kommunalari ábyrgd.

### *Tilmæli:*

- ***Kommunurnar skulu hava fulla ábyrgd av skúlabókasavnsøkinum og fólkabókasavnsøkinum.***

# Bókmentalisti

Birkemo, A., 2002, Læringsmiljø og utvikling: Unipub AS.

Desforges, C. w. A., Alberto, 2003, The impact of parental involvement, parental support and family education on pupil achievement and adjustment: A review of literature.: Research Report RR433 . Dep.for education and skills. Nottingham, UK.

Kommunal- og regionaldepartementet, N., 2006, Om KOSTRA. http://odin.dep.no/krd/norsk/tema/kommune/kostra/omkostra/016051-990777/dok-bn.html.

Nordahl, T., 2000, Samarbeid mellom hjem og skole – en kartleggingsundersøkelse: NOVA Rapport 8/00.

OECD, 1997, Parents as Partners in Schooling. http://www.oecdbookshop.org/oecd/display.asp?sf1=identifiers&st1=961997021P1: Centre for Educational Research and Innovation, OECD, p. pp 208.

### Tilvísingar til heimasíður

www.kvis.org

www.kvis.org/UB/lige_muligheder_metro/index.html

www.kvis.org/UB/metro/OmUdsatteBoernProdukter.html